# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



## SOSIALA NETVERKIÐ

Filmurin The Social Network er søgan um Facebook, sum flestu okkara kenna og brúka. David Fincher hevur gjørt filmin, sum hugtakandi og hugvekjandi. Víst verður, hvussu Facebook varð skapt, og hvussu stríðið um rættindini til sosiala netverkið var. Facebook hevur skapt nógv nýggj vinarløg, men Facebook kostaði vinarlagið millum menninar, sum skaptu tað.

**THE SOCIAL NETWORK**
Dvd ella Blu-Ray



## KONGALIG MYNDABÓK

29. apríl skulu William prinsur og Kate giftast, og tað verður størsta kongaliga hendingin í Bretlandi, síðani foreldur William, Charles og Diana, giftust. Alison Jackson hevur gjørt ein stuttliga bók um sambandið millum Kate og William. Myndabókin gevur okkum eitt innlit í kongaliga kærleikan millum tey bæði. Myndirnar vísa barndómsmyndir av teimum báðum, og annars verður lesarin leiddur heilt fram til brúdleypið, sum nú skal verða.

**ALISON JACKSON**
A Right Royal Fairy Tale
Quadrille Publishing



## MÓTI OG MODELLIR

Leygarkvøldið bjóðar Rás2 enn eina Hvonn Live sending. Hetta er sending við práti, undirhaldi og live-tónleiki, sum Rás2 sendir beinleiðis av Hvonn í Havn. Hesaferð er móti og mótaheimurin evnið. Kenda modellið Oliver Bjerrehuus og føroska unnusta hansara, Gunnvør Dalsgaard vitja sendingina, og eisini verður tosað við føroyskar modellir, mótaskaparar og onnur. Lena Anderssen stendur fyri live-tónleikinum.

**HVONN LIVE**
Rás2
Leygarkvøldið 16/4 kl. 20



## PAPAGEYKUR Á FERÐ

Rio er ein 3D animeraður filmur, sum tey, ið framleiddu Ice Age filmarnar, hava gjørt. Filmurin gongur fyri seg í Rio de Janeiro og í brasilska regnskóginum. Søgan er um papageykin Blu, sum býr í USA, men sum fer til Brasil at leita eftir seinasta papageykinum, sum er av hansara art. Tað er ein hon-papageykur, og so er sjálvsagt kærleiki í luftini.

**RIO**
Biograffilmur
Frá hósdegnum 14/4



## STEYPABRAK Í ONGLANDI

Um vikuskiftið skulu finalistarnir í góðu, gomlu FA Cup steypakappingini finnast. Sunnudagin hittast Bolton og Stoke í seinnu hálvfinaluni, men enn meira fokus verður á fyrru hálvfinaluna leygardagin. Tá hittast grannarnir í Manchester, United og City. Semifinalurnar í FA Cup verða spældar á Wembley, og bert ein dystur verður spældur.

**MANCHESTER CITY-MANCHESTER UNITED**
FA Cup hálvfinala
Leygardagin 16/4 kl. 17.15




## DURAN DURAN DUGA FRAMVEGIS

Poppdreingirnir úr Birmingham, sum vóru tað stóra í 80'unum, eru framvegis virknir við útgávum og konsertum. Og teir duga. Nýggja fløgan hjá Duran Duran, All You Need Is Now, hevur fingið góð ummæli, og sagt verður um bólkin, at hann dugir at endurskapa seg sjálvan og koma víðari við sínum tónleiki. Samstundis eru eisini onkur ekkó frá farnum døgum á hesi útgávuni.

**DURAN DURAN**
All You Need Is Now